## Skattalættarnir hjá Eidesgaard kostaðu 382 milliónir um árið

Árini 2004 til 2008 gav landsstýrið hjá Jóannes Eidesgaard skattalættar, sum hava kostað 382 milliónir krónur um árið. Tað sigur Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharri, í einum svari til ein fyrispurning frá Høgna Hoydal. Tað var ABC samgongan millum Javnaðarflokkin, Sambandsflokkin og Fólkaflokkin, sum gav hesar skattalættar. Høgni Hoydal vísir í fyrispurninginum á, at ABC samgonga segði, at skattalættarnir skuldu geva 60 milliónir krónur um ári – ella tilsamans 240 milliónir krónur. Høgni Hoydal spyr: • Hvussu nógv hava skattalættar kostað landskassa og kommunum frá 1998 til 2003? og • Hvussu nógv hava skattalættar kosta landskassa og kommunum frá 2004 til 2009? Jóannes Eidesgaard svara, at var 1998 skattastigin eisini galdandi í 2003 hevði hetta givið landskassanum eina meirinntøku uppá 103 milliónir krónur. Var 2004 skattastigin eisini galdandi í 2009 hevði hetta givið landskassanum eina meirinntøku upp á 382 milliónir krónur. Í tíðarskeiðnum 1998 til 2003 var barnafrádrátturin í landsskattinum hækkaður við áleið 44 milliónir krónur og merkti hetta tilsvarandi skattalækking. Í tíðarskeiðnum 2004 til 2009 var barnafrádrátturin í landskassanum ikki broyttur. Broytingar í landsskattinum hava eisnini eina ávísa ávirkan á kommunskattin orsakað av 50% markinum, men talan er her um sera smáar uphæddir, sigur fíggjarmálaráðharrin í svarinum.

# Fái eitt kick av at syngja



**Føroyingar og íslendingar áttu at samstarvað um Melodi grand prix, tí íslendingar elska føroyingar, sigur Jógvan Hansen, sum verður millum teir seks finalistarnar í íslendsku sangkappingini**

TÓNLEIKUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Tað hevði hóskað betur um føroyingar og íslendingar vóru saman í Melodi grand prix, enn at føroyingar luttaka í tí danska. Tað heldur nýkosni føroyski finalaluttakarin í íslendsku sangkappingini, Jógvan Hansen, sum sang seg inn í íslendsku hjørtuni leygarkvøldið.

Hann vísir á, at íslendingar elska føroyingar, og ivast í, um alskurin millum danir og føroyingar er eins stórur. Og tí áttu føroyingar heldur at samstarvað við íslendingar um luttøku í altjóða sangkappingini.

### Droymir um Oslo

Tað er annars ein hjartansfegin Jógvan Hansen, sum Sosialurin fær orðið á í morgun. Hann hevur eisini orsøk fegnast, nú hann sang seg í finaluna í íslendsku sangkappingini, sum verður 6. februar.

Hansara størsti dreymur í løtuni er at sleppa at framføra á stóra pallinum í altjóða finaluni í Oslo í mai, tí, sum hann sigur:

- Eg elski at upptraðka og fái eitt ordans kick av at syngja fyri fólki, sigur Jógvan Hansen.

- Tað besta við at sleppa víðari í finaluna er, at tað er ein álitisváttan til mín sum undirhaldara, ella entertainara, hugleiðir 31 ára gamli klaksvíkingurin, sum hevur búð í brøðratjóðini síðan 2004.

Sambært honum hevur tað alstóran týdning fyri fólk sum hann at fáa viðurkenning og at verða góðtikin sum undirhaldarar.

- Tí øll mín karriera er treytað av, at fólk tíma at lurta eftir mær, sigur hann við Sosialin.

Størsti dreymurin er alla tíðina at sleppa at framføra fyri einum størri skara av fólki. At kunna liva av tónleikinum og at undirhalda. Eins og stóru fyrimyndirnar, so sum Michael Bublé ella Sting.

### Seldi salongina

Burtursæð frá sanginum, hevur Jógvan Hansen virkað sum vælumtóktur frisørur í Íslandi, árini hann hevur búð haryvuri. Eitt nú átti hann part av einari stórari salong við 15 starvsfólkum og 4000 føstum kundum. Men hann valdi at selja sín part frá í 2007, tí tíðin rakk ikki til at arbeiða so nógv og at hava eina sangkarrieru.

- Hetta var tíbetur áðrenn kreppuna, so eg kom væl burturúr tí. Og hon fer altíð at vera mítt hjartansbarn, sigur hann, og fegnast um, at salongin framvegis hevur stóra succes.

Í løtuni tekur Jógvan Hansen studentaskúlaskeið, sum tekur eitt ár. Kanska fer hann at lesa víðari, ella fer hann at arbeiða aftaná. Enn er onki vist, tí, sum hann sigur:

- Eg taki ein dag í senn.

### Veruligur føroyingur

Tað er ongin ivi um, at íslendingar eru góðir við føroyingar. Ikki minst í hesum tíðum. Men Jógvan Hansen heldur ikki, at tað beinleiðis er ein fyrimunur at vera føroyingur í Íslandi. Men tað er so avgjørt heldur ongin vansi.

- Íslendingar hyggja ikki so nógv eftir, hvar tú ert frá. Gjørt tú tað gott, so kann tað gera tað sama, hvar tú ert frá, sigur hann, og skoytir kortini uppí:

- Men eg havi ongantíð verið meira føroyingur enn her í Íslandi.

# Jógvan í finaluni í Grand Prix

**Jógvan Hansen sang seg leygarkvøldið í finaluna í íslendska Grand Prixnum. Jógvan kappaðist við fýra aðrar sangir í innleiðandi kappingini.**



Bubbi trýr uppá Jógvan

Hetta var annað av fýra innleiðandi umførum í íslendska Grand Prixnum. Tveir sangir koma víðari hvørjaferð, og leygarkvøldið tryggjaði Jógvan Hansen sær so pláss í finaluni.

Jógvan sang sangin One More Day, sum Óskar Páll Sveinsson og Bubbi Morthens hava skrivað til Jógvan.

Finalan í íslendska Grand Prixnum verður hildin leygarkvøldið 6. Februar, og tá hevur Jógvan Hansen so møguleikan at vinna seg í europeisku kappingina, sum í ár verður hildin í Oslo.

Bubbi Morthens væntar sær nógv av Jógvani Hansen í íslendska Grand Prixnum.

Hetta er triðju ferð, at Jógvan Hansen luttekur í íslendska Grand Prixinum, og Bubbi væntar, at hesaferð fer tað at eydnast Jógvani.

Sangurin, sum Jógvan hevur sungið, eitur One MoreDay og er skrivaður av Bubbi Morthens og Óskar Páll Sveinsson.

- Eg ivist ikki í, at Jógvan fer at vinna Grand Prixið. Sangurin, sum vit hava skrivað til hansara, er góður, og Jógvan hevur alt, sum skal til, fyri at vinna eina slíka kapping, sigur Bubbi Morthens.